# Tað er lív í býnum

**Desember mánaði er tann lívligasti mánaðin í náttarlívinum kring alt landið. Ein munur millum desember og allar hinar mánaðirnar er, at í jólamánaðinum eru fólk í náttarlívinum penari ílatin**

Tað hendir nógv í jólamánaðinum – eisini í náttarlívinum, har jólafrokostar í langum banum seta sín dám á lívið.

– Tað eru nógv fleiri fólk í býnum í desember enn hina tíðina á árinum, og í desember er býurin á tremur við fólki bæði fríggjakvøld og leygarkvøld, sigur Havgrímur Johannesen, sum saman við øðrum eigur og rekur støðini Café Natúr, Rex og Eclipse í Havn.

– Ein munur millum desember og allar hinar mánaðirnar er, at í jólamánaðinum eru fólk í náttarlívinum penari ílatin. Tað er næstan ikki eitt mannfólk – líkamikið um tað er 18 ella 50 – sum ikki er í slipsi. Og kvinnurnar gera sjálvsagt nógv burtur úr klæðunum eisini, sigur hann.

## Útisetar síggjast aftur

Jólafrokostar verða hildnir allastaðni, og tað eru serliga fólk frá hesum jólafrokostum, sum gera at tað eru meira fólk í býnum enn vanligt.

– Tað eru eisini nógvir útisetar heima í desember, og teir síggjast aftur í býnum. Tað er ein øðrvísi stemningur í desember, og tú merkir væl at tað er ein hátíðardámur yvir jólamánaðinum, sigur Havgrímur.

Hóast fólkini næstan koma av sær sjálvum í býin í desember, so verður eitt sindur meira enn vanligt gjørt burtur úr undirhaldinum.

Í ár ber til at uppliva bæði dansibólkar, trubadourar, stripp, snowparty og serligt nissuøl í Havnini. Ein tann best umtókti føroysku dansibólkurin seinnu árini, Showmenn, fer at spæla á Rex øll fríggjakvøld og leygarkvøld í desember mánaði.




























